# BØNARLØTAN

**NOVEMBER** **2022** **37. árg.**

## *1. Týsdagur* *Josva 10.1-27*



### Samfelagsstevnan í Ebenezer og í Høllini á Hálsi 2-6. november 2022

Gerið HARRAN stóran saman við mær, latið okkum saman seta navn Hansara høgt! *Sálmur 34.4*

Byrjað verður mikukvøldið. kl. 20 við bønamøti í Ebenezer. Sunnud. morgunmøti í Ebenezer kl. 10.30 og barnamøti á Hálsi kl. 12. Nátturði kl. 17.30. Opið hús á Hálsi fríggjakv. kl. 22.30 og leygarkv. kl. 21.30. Sangur: Ebenezerkórið, Betesdakórið og onnur. Sí lýsing á ebenezer.fo

**KRINGVARPIÐ**
13. nov. sjónvarpsandakt, Høgni Johannesen
20. nov. sjónvarpsmøti frá samfelagsstevnuni

**EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukvøld kl. 21.00. Kelduvaðið (endursent hóskvøld kl. 21)
Týskvøld kl. 21.00. Á torginum (endursent sunnudag kl. 12.30)

## *2. Mikudagur* *Áp. 7.20-40*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
Vit eru í Teilandi 27. okt.-18. nov. Nevndarfundir eru 1-4. nov., og 7-11. nov. verður altjóða ráðsteva fyri um 210 umboðum frá londum, har NTM hevur tænastu. Hetta er fyrstu ferð í seks ár orsakað av koronu.

**Vanja og Svein í Prestgarði, Svend 14, Terji 10, Petra 8**
Eg skal bera evangeliið fram í sangi og talu á samfelagstevnuni í Havn og hava jólakonsert í Lívdini 20. nov. Eri partur av møtum á sambýlum, sjúkrahúsum og millum alkoholikarar. Eg syngi eisini til jarðarferðir og møti tørvi annars, har fólk sakna vitjanir. Sangurin *Eg kom tá til trúgv* er innspældur og verður útgivin skjótt.

- **Rutt og John í Skemmuni**
- **Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**



## *3. Hósdagur* *Sálm. 51*

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 16, Lydia 5**

Sara og eg gleddust um stevnuna í Albania hjá IBCM, har vit vóru saman við øðrum føroyingum. Borgarstjórin í Ballerup vitjar samkomu okkara 3. nov. fyri at tosa um trivnaðin í kommununi og um, hvussu vit sum samkoma kunnu gera okkara part fyri at hjálpa menniskjum við tørvi.

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**

Vit sluppu ikki heim í summar, men møtast við familjuni í Ísrael, har eisini Kurt sleppur at ferðast uttan visum. Tanja søkir um visum at verða búgvandi í Suðurafrika. Takk fyri allan stuðul.

**ZAREPTA**

## *4. Fríggjadagur* *1. Mós. 21.1-13*

**ITALIA, Molise**

**Heidi og Regin Guttesen**
**Megan 18, Trisha 10, Emma 6**

4-6. nov. luttekur Regin á trúboðanarstevnu í Michigan, USA, við sangi og talu. Biðið fyri stevnuni og fyri heimsmissión.

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 11**

Ethnos 360 hevur altjóða leiðslufundir í Teilandi í nov. Biðið um varðveitslu á ferðini, einleika, gott samskifti í sambandi við beinleiðis tulking til nógv ymisk mál, og at Gud skal signa fundirnar.

## *5. Leygardagur* *Markus 13.1-13*

**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**



Í dag verður undirvísingardagur í Kristnastovu. Biðið, at Harrin signar Orð Sítt. 14-25. nov. verða vit í Føroyum, har vit eisini vitja nakrar samkomur.

**Susan og Øssur Berghamar**
Vit royna at hava samband við unga fólkið, sjúklingar og tey eldru, sum búgva í økinum kring Keypmannahavn. Fleiri teirra vóru á seniorsamkomuni í Kristnastovu herfyri. berghamar@kristnastova.dk

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 9, Micah 9**
Vit gleðast um, at nýggj fólk leggjast afturat. 5-7. nov. hava vit vikuskiftislegu. Vit biðja framvegis, at Harrin sendir onkran at stuðla samkomuni sum elsti.

ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## 6. Sunnudagur — *1. Mós. 21.14-34*

**FØROYAR**
**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 15, Andreas 13, Kristina 11**

Undirtøkan hevur verið góð, nú frítíðararbeiðið í Ebenezer er byrjað aftur, eftir at korona steðgaði hesum týðandi virksemi. Tey eru mong kring landið, sum gera eitt týðandi arbeiði millum børnini, fyri at tey skulu koma til trúgv á Jesus.



**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen,**
**Josva 13, Ester 12, Samuel 8**

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 16, Emma Grace 14, Jónatan 13, Markus 10, Evita 7, Joy 5**

Tað gongur væl í samkomuni í Puruándiro. Vit frætta frá Guicho og Gabriel, at teir hava gott mót, og at samkoman hevur tikið væl ímóti teimum. Biðið fyri teimum og familjum teirra.

## 7. Mánadagur — *Mark. 13.14-37*

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 11, Tabita 8, Debora 7, Natan 4**

Biðið, at Harrin kallar fleiri trúboðarar. Eli er í Teilandi 6-14. nov. NTM-stevna er 7-12 nov. fyri fólk, sum arbeiða

ymsastaðni í heiminum við NTM. 13-14. nov. eru fundir við samverkafólk í Evropa.

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**

Danmark hevur fingið góðkenning at umseta Bíbliuna til teknmál. At umseta Jóhannesevangeliið kann taka upp í tvey ár. Jan verður í USA 7-21. nov.

| *8. Týsdagur* | *1. Mós. 22.1-24* |
|---|---|

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
**Adonia 14**

Vit gera heimasíðu og fleiri STEVN programm við 15-30 videoupptøkum og tekstum. Vit royndarkoyra STEVN í løtuni og fara skjótt kring landið til møtir og í húsbólkar at upplýsa um tiltakið. Ábyrgdin sum elsti í Lívdini kemur aftrat trúboðanartænastuni.

| *9. Mikudagur* | *Mark. 14.1-26* |
|---|---|

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

30. okt. til 17. nov. verður Peter í Teilandi. Fyrru vikuna eru fundir fyri altjóða leiðsluna. Seinnu vikuna verður forum fyri leiðarar hjá NTM.

| *10. Hósdagur* | *Sálm. 52* |
|---|---|

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

Vitjanin í Sorimi gekk væl, og samkomurnar trívast, men tey hava avbjóðingar uttanífrá av gullvinnuni og øðrum virksemi. Eg havi nógv bíbliutilfar við heim, sum nú skal rættlesast.

## *11. Fríggjadagur* *1. Mós. 23.1-20*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**



Markusevangeliið verður skjótt tøkt og Matteusevangeliið verður nú eisini rættlisið. Ein ráðgevi skal kanna týðingina, áðrenn hon verða givin út. Biðið fyri Sue og mær og báðum Mixtec-toymunum.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

Eins og nógvar aðrar samkomur og kirkjur í stórbýum uppliva vit, at fólk koma og fara. Tey flyta í sambandi við arbeiði o.a. og støðast ikki altíð. Okkum tørvar stóran vísdóm at fáa fólk við, so tey skjótt verða aktivur partur av samkomu-arbeiðnum.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

*Í dag fyllir Noah Elias Hansen 11 ár

## *12. Leygardagur* *Mark. 14.27-50*

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 12, Leah 8, Abigail 4**

Ásbjørg Hjelm hjálpir okkum frá okt. til des. Síðst í okt. vóru vit á barnalegu eina viku, og 12. nov. er kvinnustevna her í Nantes. Biðið fyri børnunum, sum vóru á legu, og at trúgvandi og ikki-trúgvandi kvinnur tekna seg til stevnuna.

## *13. Sunnudagur* *1. Mós. 24.1-20*

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 6, Jude 4, Evelyn 2, Olivia 0**

Vit takka Gudi fyri, at lítla dóttir okkara Olivia veksur og mennist væl. Biðið, at vit fáa útvegað pass, so hon kann fáa innfararloyvi.

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**



Páll var áhaldsin, datt og breyt høgru mjødn. Hann varð skurðviðgjørdur í Nuuk og er nú á sjúkrahúsi í Qaqortoq til uppvenjing. Vit eru ómetaliga takksom fyri hjálpina, sum Óli Steinberg hevur veitt at rigga leguhúsini og Juvel av fyri veturin. Vit takka hjartaliga fyri forbøn.

**GRØNLAND**
**Juvel II**

## 14. Mánadagur — Mark. 14.51-72

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 16, Rebekah 14, Lydia 12**

Tað gongur væl at dagføra handbókina *Funding the Family Busines*s til nýggjar trúboðarar. Biðið um vísdóm at finna røttu orðingarnar, og at tíðin verður brúkt á fullgóðan hátt. Vit eru takksom fyri kurdisku bíbliuappina, og at kurdar í Irak brúka hana.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

## 15. Týsdagur — 1. Mós. 24.21-49

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Eftir 15 ár í trúboðanartænastu flyta vit nú til USA at taka okkum av mammu Daniel, og fyri at Daniel kann fáa nýggj knø. Vit takka Harranum fyri leiðslu og tykkara bønir og stuðul - Gud signi tykkum. Biðið framhaldandi fyri okkum og fyri orðinum, ið er sáðað í Qasigiannguit.

**FØROYAR**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



## *16. Mikudagur* *Mark. 15.1-24*

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

Av tí at ikki so nógv børn og ung koma til barna- og ungdómsmøtini, hava vit valt at leggja tey saman hvønn mikudag kl. 16.30-18. Vit eta eina máltíð saman, syngja og spæla og býta so sundur til undirvísingina.

## *17. Hósdagur* *Sálm. 53 og 54*

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Vit takka Gudi fyri 30 ár í hjúnalagi, fyri verju í tænastuni og fyri stuðulin, ið okkum er givin. Takk fyri bønirnar. Skjótt verður 1. Mós. prentað á saafimáli, bæði í vanligari skrift og arabiskari. Biðið, at orðið talar til hjørtuni, serliga til átrúnaðarligu leiðararnar.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *18. Fríggjadagur* *1. Mós. 24.50-67*

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

Seinasta ferðin til Kankanaeyfólkið gekk sera væl, og Liz var væl fyri. Eg arbeiði saman við trimum monnum, sum allir eru aktivir í samkomuni og at evangelisera. Eg endurlesi aftur Tessalonikatilfarið og byrji síðani at arbeiða við Rómbrævinum. Hetta er umfatandi arbeiði.

## 19. Leygardagur — Mark. 15.25-47

**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Vit eru sera takksom fyri, at Annika fekk visum í eitt ár aftrat. Vit vitja og stuðla familju og samkomu í Onglandi í nakrar vikur. Ætlanin er eisini at vitja samverkafólk í Marseilles og í Berlin, og vit ætla at luttaka í *outreach*, sum tey fyriskipa. Vit ætla eisini at fara ein stuttan túr til Eysturturkalands fyrst í des.

## 20. Sunnudagur — 1. Mós. 25.1-18

**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
**Atlantic Mission, Juvel II**

Ætlanin er at fara til Hetlands ella aðrastaðni á vári 2023. Biðið um Harrans leiðslu. Vit gloyma ikki, at William Gibson Sloan kom úr Hetlandi at bera okkum gleðiboðskapin.

## 21. Mánadagur — Mark. 16.1-20

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 5, Timon 3**



Biðið fyri okkum, nú vit royna at skilja torgreiddu kovolmállæruna. Trúboðarafamiljurnar eru ikki á einum máli um, hvussu frægast er at greina mállæruna til áður óskrivaða málið. Biðið, at Gud gevur vísdóm og náði at skilja og semjast. Skjótt er Gamla Testamenti umsett til kovolmálið.

## 22. Týsdagur *Es. 17.1-14*

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**

22. nov. skipar OM Føroyar fyri japankvøldi, nú Birita og John Timothy, og synirnir Jónas og Markus, eru í farloyvi í Føroyum. Í jan. fara tey aftur til Sapporo í Japan at virka í samkomu har. Logos Hope er í Montenegro og fer til Grikkalands síðst í nov. Síðst í okt. fóru Siri og Martin í Grund og synir teirra umborð í 3 mánaðir.

**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**

## 23. Mikudagur *Róm. 13.1-14*

**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**

20 okt. byrjaði enn eitt online-skeið fyri iransk/afghansk trúgvandi í Europa. Vit hittast hvørt hóskvøld í 8 vikur, og alt skeiðið er á iranska høvuðsmálinum farsi. Stívliga 150 luttakarar eru, næstan øll nýggj kristin. Í Iran er enn ófriður.

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

## 24. Hósdagur *Sálm. 55*

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 14, Noah 13, Karis 9, Judah 7, Ethan 5**

Vit eru í farloyvi í USA. Biðið fyri Ethan, sum hevur verið til kanningar fyri afturvendandi bløðrubruna. Simon fór til

Írlands at vera saman við familjuni í sambandi við, at pápin fekk skurðviðgerð fyri hjartað.

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**



Thanksgiving tiltøk eru 24. nov., og vit fyrireika møtini um jólini. Vit takka Harranum fyri, at tiltøk aftur eru á skránni eftir tíðina við Covid-19. Biðið fyri John.

**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**

*Í dag fyllir Megan Rose Guttesen 18 ár

## *25. Fríggjadagur* *Es. 18.1-7*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Síðst í nov. verður Matteusevangeliið og síðstu kapitlarnir av Lukasevangeliinum rættlisið. Tá hetta er gjørt, er alt Nýggja Testamenti rættlisið. Nógv arbeiði er tó eftir, áðrenn tað kann prentast. Eg havi býtt út 11 bøkur og brøv, sum eru rættlisin og prentað seinasta árið. Biðið, at tað verður til signing.

## *26. Leygardagur* *Róm. 14.1-23*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 13**

Tíðin í Føroyum var signingarrík, men gekk skjótt. Vit vitjaðu

samkomur, vinir og kenningar. Vit komu til USA 2. nov og verða her árið út. Ætlanin er at fara aftur til Dakar í Senegal 2. jan. 2023.

## *27. Sunnudagur* *Es. 19.1-25*

### VENESUELA, Puerto Ordaz
### Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen

Bibliuskúlin er nú byrjaður aftur, og nógv orka verður løgd í lærisveinaarbeiðið. Vit hava sett okkum fyri at upplýsa enn fleiri samkomur um trúboðanarvirksemi í ættarbólkum. Tríggir ættarbólkar skulu nú dagføra skúlabøkurnar. Nurimar vegleiðir Piaroatoymið at gera bøkurnar.

## *28. Mánadagur* *Róm. 15.1-13*

### TEILAND, Chiang Mai
### Corine og Sørin Joensen
### Eli 17, Aron 10, Noah Kristian 8

Vit fáa í meðal 7 umbønir dagliga um hjálp frá einstaklingum, hjúnum ella familjum. Hetta er nógv meira, enn vit klára at hjálpa. Vit halda fram at leita eftir nýggjum starvsfólkum til toymi okkara.



### FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)
### Monika og Tim Sharp
### Rebekka 17, Hanna 14

## *29. Týsdagur* *Es. 20.1-6*

### INDONESIA
### Krissy og Daniel Hansen
### Zephaniah 1

Vit vænta okkum eina dóttur í feb. Hetta er serligt, tí Daniel hevur 7 brøður og onga systur, 7 bróðursynir og onga bróðurdóttur. Í nov.-des. eftirmeta við mállærutilgongdina fyri at síggja, hvussu undirvísingin kann skipast enn betur. Uppgávan er tung, so biðið um vísdóm.

### JAPAN
### Shino og Hallur Mortensen
### Kano 13, Nana 11, Louie 8, Rio 3

Vit ætla at bjóða børnunum, sum ganga til enskt, eisini at koma í sunnudagskúla, møguliga á enskum. Biðið um Guds leiðslu og signing.


| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## *30. Mikudagur* *Róm. 15.14-33*

**BÓKATÆNASTAN**

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

**NÝGGJ BÓK!**
**436 síður**
**290 kr.**

John Lennox viðger týdningin av, at kristindómurin er sjónligur í almenna rúminum. Um Dániel og vinmenn hansara høvdu livað í dag, høvdu teir verið í fremstu røð millum teirra, sum stíga fram í almenna kjakinum, tá talan er um at verja kristnu trúnna og kristnu virðini.




Jákup Nolsøesgøta 17, Tórshavn
Opið týs.–frí. kl. 14.00–17.30
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo

BÓKASØLAN logos